

## Umfatandi hvalateljing í summar

Sjeynda hvørt ár verður skipað fyri hvalateljing í Norðuratlantshavi, men í summar verður teljingin meira umfatandi enn áður

Ætlanin er nevniliga, at telingin hesaferð skal fevna um alt havið kring Føroyar, Ísland, Grønland, Kanada, Noreg og Rusland.

Síðan 1982 hava Føroyar, Ísland og Grønland talt hval sjeynda hvørt ár, men hesaferð verða Kanada og Rusland eisini við í teljingini.

- Endamálið við teljingini er eitt nú at meta um stovnin og síggja, hvønn veg tað ber við honum, sigur Kate Sanderson, leiðari í NAMMCO, við NTB.

(-vilmund)

# Faðir og synir veksa um flotan

**Páll Jóanesarson og synir hansara eiga nú tveir línubátar, Sjóstjørnuna og Margit, umframt farmaskipið Sandfelli, sum kom á Havnina í gjár**




*Brøðurnir, Andrass (t.v) og Martin Jóanesarson, eru fegnir um skipið, sum familjan nú hevur keypt. Teir hava góðar vónur um, at raksturin fer at hanga saman. Fyrstu tvær lastirnar fær Sandfelli í Fuglafirði. Hetta verður fiskamjøl, sum skal førast yvir á Stavanger-leiðina í Noregi*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Farmasigling
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Í gjár kom farmaskipið Sandfelli á Havnina.

Tað er felagið P/F Run í Saltangará, sum eigur skipið, og aftanfyri hetta felag stendur móðurfelagið, Sp/F Lón í Saltangará.

Teir, ið eiga móðirfelagið og felagið, sum nú hevur keypt Sandfelli, eru Páll Jóanesarson og synir hansara. Frammanundan eiga faðir og synir eisini línubátarnar, Sjóstjørnuna, sum er fyrrverandi Báradrangur og Margit, sum er fyrrverandi Hvítabjørn.

Skipari við Sandfelli verður Martin Jóanesarson, sum er tvíburðabróðir, Edvard, ið er við Margit. Uppi á landi at taka sær av tí dagliga verður Andrass Jóanesarson, sum eisini er stjóri í P/F Run.

### Fleksibult skip

Sandfelli er keyptur úr Bergen. Skipið er bygt í Týsklandi og hevur verið heimahoyrandi í Noregi síðan 1996. Longdin er 63 metrar og breidddin 11,30, og Sandfelli lastar 1000 tons.

Høvuðsmotorurin er ein 800 HK. Callesen Diesel, skipið hevur tveir Deutz-ljósmotorar og ein aksilgenerator.

Andrass Jóanesarson sigur, at minsta manningartal umborð er 4, men um summarið er ætlanin, at 5 mans skulu verða við, tí tá verður í størri mun høvið til viðlíkahald omandeks.

Eigararnir hava ikki upplýst keypsprísin, men Andrass sigur, at teir eru nøgdir við prísin, og at vónirnar um, at raksturin fæst at hanga saman, eru góðar.

- Felagið í Bergen, BSC (Bergen Shipping Chartering), sum syrgdi fyri farminum hjá Sandfelli fyri eigaraskiftið, fer framhaldandi at taka sær av hesum, og tað halda vit vera ein stórur fyrimunur.

Andrass sigur, at teir spurdu BSC, um teir høvdu áhuga í at halda fram eftir eigarskiftið, og tað vildu teir fegnir.

- Bæði BSC og tey feløg, sum skipið hevur siglt fyri, eru sera glaðir fyri Sandfelli, tí skipið er einfalt og driftssikkurt.

Hann sigur, at skipið er ein sonevndur »sjálvlossari«, sum hevur brøyt á dekkinum, ið koyrir eftir skinnara og soleiðis røkkur um alla lastina.

- Lastin er uppbygd, og síðurnar eru beinar heilt niður á banjaran. Hetta ger lasting og lossing lættari og ger skipið meira fleksibult. Tað er eisini skjótt at vaska lastina ímillum túrarnar, sigur hann.

### Úr Fuglafirði

Andrass Jóanesarson sigur, at Sandfelli lastar fyrstu lastina í Fuglafirði, og gongst sum ætlað, loysir skipið aftur úr Fuglafirði í morgin.

- Okkara fyrstu uppgávur verður mjølflutningur úr Fuglafirði til Stavanger-leiðina í Noregi, og í fyrstu syfti fáa vit tvær slíkar lastir úr Fuglafirði, áðrenn farið verður aðrar vegir, sigur reiðarin.

Sosialurin fer at venda aftur til Sandfelli í blaðnum í morgin.

Grindamenn:

# Øll nevndin afturvald

**Á aðalfundi hjá Grindamannafelagnum leygardagin varð avgjørt, at nevndin heldur fram, óbroytt**

AÐALFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
vilmund@sosialurin.fo

Tveir nevndarlimir og tríggir varalimir stóðu fyri vali, og hesir vórðu allir afturvaldir.

Soleiðis heldur sitandi nevnd fram óbroytt.

Í nevndini eru Ólavur Sjúrðarberg, Leirvík, Regin Jespersen, Sørvágur og Hans Jákup Hermansen, Tórshavn.

Eykalimir eru Hanus Højgaard, Tórshavn, Gutte Guttesen, Bøur og Andrass Joensen, Klaksvík.

Ólavur Sjúrðarberg, formaður, sigur, at bæði samveran um morgunin og aðalfundurin stundisliga seinnapartin leygardagin eydnaðust væl.

- Fyrilesturin um grindabýti var áhugaverdur, leggur hann aftrat.

Á aðalfundinum varð kunnað um hvalateljingina TNASS 2007, og kunnað varð eisini um satelitmerking av grind, springara og kópi.

- Kunnað varð eisini um IWC-fundin, sum verður í juni og um grindakanningar í ár, sigur Ólavur Sjúrðarberg.

Sum heild, ein áhugaverdur og upplýsandi aðalfundur í Grindamannafelagnum.



*Aðalfundurin hjá Grindamannafelagnum leygardagin var góður og upplýsandi. Á myndini verður grindahvalur skorin upp á Sjómannadegnum í Klaksvík*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*